# Nógv skal fáast upp á

**- Tað er nógv ting, tú ikki ordiliga fært gjørt fyrr enn í síðstu løtu, og tí eru seinastu dagarnir uppundir vinnustevnuna altíð ein rokalig tíð her hjá okkum, sigur Símun Hammer, stjóri í Sp/f Virkisráðgeving, sum er samskipari av FaroExpo og Mentanarvikuni**



FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um fáar dagar verður triðja FaroExpo vinnustevnan í røðini sett í Ítróttarhøllini í Runavík.

Meðan sjálv vinnustevnan í Ítróttarhøllini í Runavík og vinnuráðstevnan, sum er í Kelduni í Skálafirði, vara í tveir dagar tilsamans, varar Mentanarvikan frá sunnudegnun 28. oktober til og við sunnudagin 4. november, báðir dagarnir íroknaðir.

FaroExpo verður soleiðis týsdagin 30. oktober og mikudagin 31. oktober.

Símun Hammer, stjóri í Sp/f Virkisráðgeving, hevur í fyrsta lagi Rannvá Troest, sum áður arbeiddi á Kunningarstovuni í Saltangará, sum sína sjónligu høgru hond í samskipingini.

Undanfarnu árini hevur Rannvá eisini hjálpt Virkisráðgevingini tær seinastu vikurnar undan stóra tiltakinum, og tá hevur hon serliga lagt tey mentanarligu tiltøkini til rættis.

Men tað eru mong onnur, sum eisini eru við í arbeiðnum at fáa alt at sampakka, tá Mentanarvikan og seinni FaroExpo fara av bakkastokki.

## Heldur fleiri

Símun Hammer sigur, at talið av fyritøkum, sum vóru við í fjør, lá um 40, og talið í ár er ikki minni, kanska heldur størri. Út við helmingurin er úr útlandinum.

- Jú, tað er eitt tak at fáa alt tiltakið upp at koyra, og tað eru eisini nógv ting, sum skulu gerast dagarnar uppundir byrjanina.

Hann vísir á, at tað heilt einfalt eru nøkur ting, tú ikki ordiliga fært gjørt fyrr enn í síðstu løtu, og tí kunnu seinastu dagarnir vera nokso strævnir.

Men, leggur hann aftrat.

- Tað er heldur ikki soleiðis, at vit hugsa um at gevast á hendur og ikki ætla at halda fram við FaroExpo og Mentanarvikuni, sum nú hava verið afturvendandi tiltøk í kommununi triðja árið á rað.

Hann sigur, at vanligt er at hava eftirmetingarfund um, hvussu partarnir halda, at alt eydnaðist, og tá verður stýringsbólkurin fyri Eysturoyar Vinnulívsfelag sjálvsagt eisini tikin upp á ráð.

- Á slíkum fundum verður eisini hugt í bakspeglið og mett um, um vit, sum stóðu aftanfyri tiltøkini og tær fyritøkur, sum við vóru, náddu teimum málum, ið sett vórðu út í kortið.

Símun sigur, at stigtakararnir og fyriskipararnir eisini eftirmeta úrvalið og breiddina av fyritøkunum, sum vóru við. Hetta verður gjørt við tí fyri eyga at meta um, hvørt onkrar nýggjar – og møguliga størri - fyritøkur møguliga skuldu verið við eitt annað ár.

Hann sigur, at tá ið innbjóðingar verða sendar út, fer Virkisráðgevingin eftir teimum málbólkum, sum hildnir verða at tæna vinnustevnuni og luttakarunum á bestan hátt.

## Øðrvísi skipan

- Hugskotið aftanfyri tiltakið er at menna samstarv millum fyritøkur og feløg av ymiskum slagi, føroyskar og útlendskar. Í stuttum er endamálið at geva teimum, sum við eru, høvi at selja – og/ella keypa - meira.

Á eini vanligari framsýning ella sølustevnu, sum vit kenna tær í Føroyum og uttanlands, vísa fyritøkur fram sínar vørur og tænastur.

- Men á FaroExpo ræður tað í fyrsta lagi um at skapa kontaktir, at samskifta og knýta bond. Hesin háttur fyri sølu og keypi av vørum og tænastum er væl dámdur og hevur vundið uppá seg kring um heimin.

Símun sigur, at hesin háttur er bæði bíligari og effektivari, tí her stendur tú ikki og bíðar eftir møguligum viðskiftafólki ein stóran part av tíðini, sum tú vanliga gert á eini sølustevnu.

- Á eini vinnustevnu sum FaroExpo kanst tú vera virkin alla tíðina og soleiðis brúka tíðina optimalt. Tað er meira upp til einstøku fyritøkuna, hvussu væl og effektivt viðkomandi dugir at brúka tíðina, sigur hann.

## Nakað fyri eygað

Sosialurin hevur verið við á báðum teimum undanfarnu vinnustevnunum í Runavík, og tú sært skjótt, at her er talan um eitt annað slag av stevnu enn eitt nú North Atlantic Fish Fair, har framsýnarar í flestu førum hava ymiskt vøruúrval við á sínum básum.

Og tó.

Allir básarnir á FaroExpo eru kortini ikki bara hvítir og berir allir, sum teir eru. Tað eru fleiri, sum prýða básin við ymiskum



*Tey húsast í norðara enda niðri undir og uppi á loftinum. Hetta er ikki nakar stórur skrivstovubygningur, men her hendir nógv, og Sp/f Virkisráðgeving hevur eitt nú leitt nógvar fyritøkur fram til ISO-góðkenningar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## FAKTA

Felagið, sum stendur aftanfyri FaroExpo, er Eysturoyar Vinnulívsfelag, sum hevur sitandi ein stýringsbólk, ið virkar sum eitt slag av starvsnevnd.

Stýringsbólkurin hevur tær yvirornaðu uppgávurnar við FaroExpo, og síðan er tað Sp/f Virkisráðgeving, ið hevur sæti á Høgabóli, sum er samskipari av vinnustevnuni.

Virkisráðgeving samskipar eisini Mentanarvikuna saman við Runavíkar kommunu.